ÍTRÓTTUR FÓTBÓLTUR

effo deildin

DYSTURIN HESA VIKUNA

SIGFRÍÐUR UM STØÐUNA Í VÍKINGI *Vit hava for fá stig. Vit gera tað torført fyri okkum sjálvar móti AB í fyrsta umfari, tá teir vinna fult uppiborið, men tað eru umstøður, sum gera at vit ikki fáa tað at rigga. Vit skulu eisini vinna á Skála, men skapa ikki nokk. Dystin móti B36 kann eg blíva við at tosa um. Tað er einki at ivast í, at Rúni Gaardbo hevur ein óhepnan dag. Vit hava eisini møguleikarnar móti KÍ í Klaksvík. Spælararnir vísa moral og tað er eitt stig á leiðini.*

AVRIK: *tøl 1 til 6*

HAVNAR BÓLTFELAG 1904

Teitur M. Gestsson 4
Tók tað kann skuldi og átti ikki lut í málunum hjá Víkingi. Hevði onkra bjarging, men annars var ikki so nógv at gera av beinleiðis royndum.

Jógvan Rói Davidsen 3
Tað ert altíð sprell í manninum og hann einki verri fyri enn hann var áðrenn hann bleiv skaddur. Slapp tó sjáldan at útfolda seg í hesum dystinum.

Jóhan Troest Davidsen 2
Átti báðar gávurnar, tá Víkingur minkaði um munin til 2-1. Hann hevði eisini onkra minni hepna avlevering í uppspælinum. Undir standard fyri landsliðsmiðverjan.

Rógvi S. Holm 4
Var nógv meiri sjónligur í verjuni og stemplaði væl upp í fleiri førum. Tók eisini fleiri rættar avgerðir, tá Víkingur fór í mótálop.

Pál M. Joensen 3
Hevur lagt upp til nøkur góð mál í ár, men hesa ferð mundi álopssinni hjá vinstra bakkinum kostað í hinum endanum. Hevur sett á vinstra bakk plássið við fleiri jøvnum avrikum

Tróndur Jensen 3
(Út 82.min)
Hevði ikki ein av sínum bestu dystum í framrættaði spælinum. Tað gekk í løtum ov seint fyri seg. Vann onkrar gløggar bóltar á miðvøllinum.

Heini Vatnsdal 4
Hevur eitt ótrúligt drive, tá hann fyrst fær ferð á. Hann átti stóran lut í fyrsta málinum, tá hann rann Víkinga verjuna um koll. Mennist á tekniska økinum og ein arvatakari til Fróða Benjaminsen í álandsliðnum við tíðini

Fróði Benjaminsen 4
Var í fleiri tvídystum í leypi av dystinum og var heppin ikki at fáa gul fyri onkra takling. Var um reppið at skora flott mál í fyrra hálvleiki, men annars eitt javnt gott avrik frá liðskiparanum.

René Shaki Joensen 3
(Út 86.min)
Hevur havt trupult við at finna seg til rættis í HB. Spældi á høgra vongi og fekk eitt mál, har ferðin kom honum til góðar. Ikki avgerandi fyri dystarútfall og stendur enn í menning.

Kristin R. Mouritsen 4
Aftur eitt javnt og gott avrik frá Kristini, sum arbeiður hart og er góður á bóltinum, men onkuntíð manglar at síggja skjótu og avgerandi loysnina. Skoraði fyrsta málið.

Andre av Fløtum 4
(Út 89.min)
Ótrúliga gevandi at sita og hyggja eftir bólttrygga framherjanum, sum ferð aftaná ferð pilkar bóltar niður og fordeilur teir víðari. Hevði møguleikan at avgera, men skotið fór langt uppum. Málini mangla til eitt vist.

Símun Samuelsen
(Inn 82.min)
Kom inn seinastu átta minuttirnar, men ov stutt til at gera eina meting. Kom í eina góða støðu, men gleið í avgerandi løtuni.

Levi Hanssen
(Inn 86.min)
Ov stutt inni til at gera ein meting

Poul Ingason
(Inn 89.min)
Kundi bæði havt skorað og fingið reytt kort stutt løtuna hann var inni. Fyrst bjargaði Geza Turi stútarinum og løtu seinni sparkaði hann út eftir Atla Gregersen í tvídysti

SO GLAPP HJÁ FINNI

Málturkurin hjá Finni Justinussen er fyribils av. Við tveimum málum móti HB í Gundadali tryggjaði Finnur Justinussen Víkingi eitt týdningarmikið stig í Effo-deildini





HAVNAR BÓLTFELAG 1904 (1-0) 2-2 B71 SANDOY 2008

Tróndur Arge – Gundadalur

1-0: Kristin R. Mouritsen 45.
2-0: René S. Joensen 53.
2-1: Finnur Justinussen 71.
2-2: Finnur Justinussen 77.
Dómari: Páll Augustinussen

Tað eru tjúgu minuttir eftir av dystinum í Gundadali. HB er á odda 2-0 og hevur fult tamarhald á dystinum. Innanhýsis er víkingarnir farnir at skeldast og rógva ikki í takt. Máttloysið er til at fáa eyga á, og ringa gongdin stendur til at halda fram.

Víkingur sparkar burtur og støðan tykist vandaleys. Landsliðsmiðverjin, Jóhan Troest Davidsen, er fystur á bóltin, meðan málleysi Finnur Justinussen eltir.

Brádliga byrtist ein vón, tá Jóhan ikki rakar bóltin. Finnur setur ferð á móti málinum, men landsliðsmiðverjin rennur hann upp – men glíður aftur.

Eftir fimm málleysar dystir er Finnur Justinussen kaldur frammanfyri málinum og skorar. 2-1 og Víkingur gert klárt at bjóða HB av.

Í høvdinum hjá Finni Justinussen er ikki nógv hent, hóast hann hevur fingið hol á fyri kappingarárið 2014.

– Eg síggi tað, sum eg fái tvær gávur frá Jóhan. Fyrst glíður hann og so fari eg avstað. Eg síggi so, at hann kemur aftur í aftur, og eg royni at prika bóltin afturum hann. Bólturin liggur væl og eg fái skotið hann í málið, sigur Finnur og leggur afturat.

– Tað var deiligt at síggja bóltin fara í málið, men tað var bara til 1-2, so tað var at fáa arbeiðshandskarnar upp á aftur og arbeiða víðari, sigur Finnur Justinussen.

Tað er ein eginleiki, sum Finnur hevur. Hann arbeiður hart líka mikið hvat.

– Finnur er eyðmjúkur og hann er sinnaður at arbeiða fyri liðið. Mangan hevur tú áleyparar, sum eru bangir fyri at arbeiða fyri liðið, men tað er ikki tilfeldið við Finni. Hann arbeiður altíð hart. Í dag spælir hann á høgra vongi í fyrra hálvleiki og stríðist. Hann ger tað hann verður biðin um. Ein klassa spælari, sigur Sigfríður Clementsen, venjari hjá Víkingi.

Finnur javnar

Fyrri hálvleikur var javnur, har hvørki av liðnum kemur til teir heilt stóru málmøguleikarnar. Við seinasta sparkinum í fyrra hálvleiki leggur HB seg á odda 1-0. Heini Vatnsdal er lykilin, tá hann vinnur tvídystin móti Erlingi Jacobsen í høgru og leggur innfyri. Kristin R. Mouritsen er vakin og skorar til 1-0.

Seinni hálvleikur er ikki tíggju minuttir gamal, tá HB kemur upp á 2-0. René Shaki Joensen kemur frá høgra vongi og rennur inn um verjuna hjá Víkingi. Hann kemur framvið verjuni og skorar til 2-0.

Fram til tjúgu minuttir eru eftir bendir lítið á, at Víkingur fær stig í Gundadali. Men fyrst minkar Finnur við fyrr umtalaða málinum. Seks minuttir seinni ber aftur til hjá Finni. Uppspælið er í høgru og endar við, at Sølvi Vatnhamar leggur bóltin útfrá til framherjan, sum skorar.

– Tað fyrra málið hjálpir mær væl at trúgva upp á tað næsta málið, sum er eitt væl uppspælt mál. Tá lætnaði tað av álvara. Tað er tað fyrsta málið vit hava fingið ár, sum er eitt væl spælt álop. Hini hevur verið deyðbóltar og sjálvmál, greiðir framherjin frá og leggur afturat.

– Tú fær eitt ordiligt »boost« av at skjóta mál. Av at tað aftur riggar, so tá vit skora til 2-2 fara vit eisini eftir tí triðja. Nú vóni eg bara at tað heldur fram, sigur Finnur Justinussen.

Dysturin endar 2-2. Bæði liðini høvdu royndir móti endanum av dystinum.

Nógv trýst á málskjúttanum

Tað hevur merkt unga framherjan, at hann ikki hevur skotið mál fyrstu fimm umførini. Hetta er ikki fyrstu ferð, men tað ger tað ikki lættari.

– Eg hevði eisini ein málturk í fjør. Eg skoraði tvey mál í fyrsta umfari, men so skoraði eg ikki aftur fyrr enn

KOYR Á HB



Allan Enghamar: *HB fjeppari*
Hava enn einaferð stýr á dystinum, men klára at loyva Víkingi inn í dystin. 2 mist stig. Tíbetur er kappingin lang og vónandi klára vit at halda allar 94-95 min næstu ferð.

effo deildin